tíðindablaðið sosialurin
Postsmoga 76,
3800 Argir,
telefon 11820
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaksstjóri og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen, Jóhann Mortensen og Jan Müller
Lýsingar: Árni Joensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Truplar samráðingar

oddagrein

FLESTU LØNARSÁTTMÁLARNIR eru sagdir upp. Millum annað er talan um arbeiðarafeløgini í Havn og í Klaksvík, Føroya Arbeiðarafleag, Fiskimannafelagið, Føroya Handverkarafelag og Prentarafelagið.

SAMRÁÐINGAR hava verið, og halda fram. Í flestu førum er semingsstovnurin komin upp í og sambært reglugerðina hjá semingsstovninum, hevur hann longt tíðarfreistina til ein møguligan arbeiðsstað til einaferð í hesi vikuni. Í onkrum føri til næstu viku. Men fyri Føroya Handverkarafelags viðkomandi er freistin longu úti, og verkfallið byrjaði mánadagin á miðdegi.

TAÐ VERÐUR ofta sagt, at verkfall ikki tænir nøkrum av pørtunum. Tað er í fleiri førum beint. Men vælskiljandi er, at tá ein lønarbeiðarabólkur sær, hvussu lívsgrundarlagið verður máað undan honum, er lítið annað til at taka, enn at leggja arbeiði niður.

SUM EIN felagsnevnari fyri øll fakfeløgini, sum hava sagt sáttmálan upp, er ikki so nógv ynski um eitt ávíst krónutal, men heldur ivin og óttin um, hvat vit í framtíðini fáa fyri hvørja krónu.

HER HEVUR lønarbeiðarin alla orsøk at vera á varðhaldi. Longu hava teir fingið knívin í baki við 0-stillingini av prístalinum. Og ikki økti tað um optimismuna hjá hesum bólkum, tá sjálvur løgmaður í síni 1. mairøðu í ár vissaði um, at teir møguligu batar, sum annar parturin á arbeiðsmarknaðinum gav og hin parturin fekk, skuldi takast frá teimum aftur á ein ella annan hátt. Fyri at undirstrika hetta, legði løgmaður dent á, at reallønarminkingin, sum hevur verið stór hesi seinastu árini, eigur at halda fram.

VIÐ HESUM hevur løgmaður ikki bert lagt seg út í samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum, men hann hevur eisini gjørt hesar samráðingar sera truplar fyri allar partar. So truplar, at torført verður at finna nakra semju. Fyrsta dømi um hetta hendi í gjár á miðdegi.

EFTIR MIKLU 1. mai røðu løgmans bóðu nøkur av fakfeløgunum um fund við hann, og ynsktu eina nærri frágreiðing um, hvat løgmaður í veruleikanum hevði í hyggju at gera. Í fyrstu syftu fingu feløgini munnligt svar og nakrar dagar seinri skrivligt. Í báðum førum eins einkisigandi sum eyðkenni er fyri henda mann.

LØGMAÐUR er kendur fyri at tala við tveimum tungum í sama heysi. Í svari sínum til feløgini sigur hann, at hann stendur við tað, hann segði 1. mai, men veit ikki hvat og nær landsstýrið fer at gera nøkur tiltøk. Men, undirstrikar hann, at hin tungi endin ikki fer at venda niðureftir.

NÚ HAVA VIT hug at spyrja løgmann. Hevur løgmaður etið alt í seg aftur, sum hann bar fram 1. mai? Ella eru orðini um hin »tunga endan« bert at rokna sum hitt vanliga orðaskvaldur, sum vant er at renna av hansara munni?

VAR TAÐ IKKI júst til »hin tunga endan«, ið løgmaður talaði til 1. mai?

»Lev stærkt — dø ung«?

Tjóðveldisflokkurin frá Erlendi og D. P. til Finn Johansen. Ein Reyðlingasøga, ið fær hugin til Dallas at fána

Teir byrjaðu so væl. Teir kollveltingarhugaðu, Erlendur Patursson og D. P. Danielsen, teir eftir táverandi umstøðum mergjaðu sosialistarnir, sum skaptu tjóðveldisflokkin og gjørdu hann til eina fólkarørslu í 50-unum, bæði innan tinggátt og fakfeløg.

Við grundarlagi í sosialistiskum og tjóðskaparsinnaðum rembingum í Íslandi og á meginlandinum, varð tann fyrsta føroyska politiska stevnuskrá, sum krevur at arbeiðararnir skulu eiga virkir, skip og framleiðslutók annars, fest á blað.

Hon er til enn. Og menninir eisini. Annar uttanfyri flokkin, hin sum skerdur fuglur í tí ivasama »sammensurium«, sum í dag enn ber heitið »Tjóðveldisflokkurin«. Tað sigst at stevnuskráin er til enn, men at tað ikki krevst at tú hevur lisið hana fyri at gerast býráðslimur fyri flokkin.

Og prostitueraður er hann, bæði í ymsar átrúnaðarligar, politiskar, familjuligar, haldaraligar, lýsaraligar, veljaraligar og aðrar meira mystiskar ættir. **Passuppáhvattúsigur** — vit kunnu jú missa atkvøður, haldarar, lýsarar, hondspáleggjarar, hetta er tann nýggja stevnuskrá flokksins.

Tað hevur verið sagt um tjóðveldisflokkin, at hann onki tilverugrundarlag hevði longur, um Føroyar høvdu fingið tjóðveldi. Tí tá var tað einasta mál, limir hansara høvdu til felags, verið fullgjørt. Tá mundu verkamenn, reiðarar, prestar, sertúarmenn, danskara-hatarar, útróðrarmenn, kapitalistar og aðrir bólkar í flokkinum farið hvør til sítt, hvør við sínum politiska endamáli. Eins og íslendski »Sjálfstæðisflokkurin« sum aftaná at Ísland fekk »sjálfstæði« frá Danmark gjørdist grammasti flokkur fyri tilknýti til størri og grimmari heimsveldi.

Men spurningurin er, um eitt slíkt »sammensurium« av áhugabólkum og politiskum prostitueraðum nakrantíð kann vera grundarlag fyri skapan av einum tjóðveldi. Seinasta »stríðslinjan« er nú løgd av býráðslimi flokksins, Finni Johansen, ið opið hevur kravt, at fólk við ávísum politiskum sjónarmiðum eiga at »fara hagar, sum tey hoyra heima«.

Meinar hann her, at sambandsmenn áttu at verið deporteraðir til Danmarkar? Neinei. Tað eru teir »reyðu« sum áttu at verið fluttir onkra aðrastaðni á klótuni. Finnur kunnger eisini eina serkenniliga rasu-teori, sum er geografiskt grundað og ætlað sum analysu-amboð innan flokin. Hansara sosialogiska niðurstøða er henda:

»Norðanfyri« (hvat?) er alt í lagi við tjóðveldismonnum. Har eru teir alt møguligt, men bara ikki »reyðir«. Haraftanfyri »sunnanfyri« (Hórisgøtu ella Hvalbiarfjørð?) eru »grimmu reyðlingarnir«, sum hava sníkt seg inn í flokkin og áttu at verið deporteraðir til Sibiria. Hvat sigur tú nú, Ove Mikkelsen? Ríð tær ikki reytt so sunnarliga, maður! Kom norður í hólmgongu við Finn reyðlingaverja!

Nú er eitt sindur síðan, at tjóðveldisflokkurin seinast hevði útreinsing innan flokkin, har »reyðir« sum Tórður Jóansson og aðrir góðir menn vórðu ekskluderaðir. Men nú krevst ikki bert ekskusión, men harafturat deportatión. Finn-in-linjan hevur hevjað svørðið.

Men tað sigst, at Finnur livir í einum mystiskum dupultlívi. Í tí privata dyrkar hann Mao, Kinesiskt, Reyð fløgg og lítlu reyðu bókina. Í tí »almenna« lívinum brínir hann harafturímóti svørð til bardaga mót reyðlingum tjóðveldisfloksins »sunnanfyri«.

Júgú, skjótt fáa vit tjóðveldi í Føroyum við nýggju komikaragarduni innan flokkin. Tað sigst, at stevnuskráin nú verður prentað á øllum 4 síðunum av wc-pappíri hvønn mánadag í »14. September«.

Við Árna Gregersen, fyrrverandi sports-journalisti á konservativa danska blaðnum »B.T.« sum chef-ideologi skal reinsast út í tjóðveldisflokkinum, og hann skal gerast til ein reinan ÍTRÓTTARFLOKK. Badminton í staðin fyri arbeiðaraveldi og flogbólt í staðin fyri tjóðveldi.

Standið stinnir, tit alvaaðilar Jóanesar Bónda. Á Leikvøllum funnust jú í forðum.

Hvat?

Jú, eh, øh, kanska nakrar tjóðveldisatkvøður. Eisini í missiónshúsinum á Slættanesi. Verjið skansan, brátt eg komi, men passupáhvattúsigur, tí vit kundu jú mist eina atkvøðu har…

Í summarhúsinum hjá Hans J. Debes…

Melvin Jones' Rubberprick Cirkus

Viðmerking: Brævskrivarin mistekur seg helst, tá hann sigur, at Finnur Johansen hevur gjørt skilna millum tjóðveldisfólk norðan fyri og sunnanfyri, um hann sipar til tað, ið kom fram á býráðsfundi fyri stuttum. Tað var Petur í Gong, sum kom við hesum, og í fjølmiðlunum varð hann endurgivin.

Blaðm.

Videohalloy'ið

Í blaðnum DU — Dansk ungdoms fællesråd nr. 4/83 — stendur hetta pettið »Pas på videospil«:

I en tid, da videospil vinder indpas i stadig flere hjem, er det måske værd at lægge mærke til en rapport fra Malaysia, der har betydet, at landet nu følger Singapore, Indonesien og Philippinerne med et forbud mod videospil.

Uddrag af rapporten siger bl.a. om vold: Spillene forherliger vold, ødelæggelse, rumkrig, drab og fart. Det skader børn og voksnes kulturelle, sociale og psykiske udvikling. Der nævnes bl.a. et spil, hvor spillerne skal køre en bil i fuld fart ad en vej fyldt med fodgængere. Målet er at køre så mange mennesker ned som muligt, og hvert trafikdrab markeres med et kors…

Nú er tað soleiðis í Føroyum, at man ofta tekur dagar ímillum, um tað er nakar, sum fær nakað burtur úr einum ella ikki — og hareftir dømir man.

Sosialurin var so óførur herfyri úti eftir einum persóni, sum hevði eitt ávist spæl. Men hvussu er við hesum mongu »Videohalloyum«, sum breiðir seg sum arvi úti um í teimum føroysku heimunum.

Hvør er tað, sum fær nakað burtur úr hesum? Mentanarliga er tað helst ikki nakar fongur og uppaftur minni peningaliga fyri samfelagið.

Ivasamur

Pylsubúðin

Mangt kunnu teir taka sær tykni av í Dagblaðnum.

At fáa ilt av at ein lítil fitt pylsubúð kemur at standa í hjartanum av okkara vala-býi. Og so skal tað vera sovorðið bjargalendi uttanum, at tað eru bara djarvastu bakkamenn, ið hótta sær at ganga. Nei, hoyr tú, hatta er skról. Ella sum maðurin segði: Nú gert tú nakað nógv av… Tvørturímóti haldi eg hatta vera eitt frágera tiltak. Eitt nú tá ið ein hevur verið í Blaðbúðini og keypt sær eitt »Rapport« — ein uggileiki hjá gomlum dreingjum — hvat er tá meira natúrligt enn, at man dettur inn á gólvið í Pylsubúðini og keypur sær eina heita pylsu. Á tann hátt fær ein bæði andaliga og likamliga føði.

Hin gamli drongurin

Luttakið í almenna orðaskiftinum í Sosialinum — skrivið vinarliga stutt og greitt